## Nýtsluinnflutningurin stendur í stað

Fyrstu tveir mánaðirnar í 2008 er innflutt fyri 756 milliónir krónur. Tað eru 53 milliónir minni enn somu mánaðir síðsta ár. Um skip ikki verða tikin við, er ein vøkstur upp á 74 milliónir krónur, sum er 11% meir enn í fjør. Innflutningurin til byggivinnuna og annan ídnað veksur framhaldandi, ávíkavist 25% og 22%. Eisini varð innflutt fyri 34% meir av brennievni. Innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtslu er ikki vaksin hesar báðar mánaðirnar, men er á leið tann sami sum seinasta ár. Innflutningurin av alifóðri er minkaður nógv hesar báðar mánaðirnar. Higartil í ár er innflutt fyri 8 milliónir krónur minni enn seinasta ár, tað er ein minking á 69%. Innflutningurin av akførum er minkaður 20%. (www.hagstova.fo)



# ngd á hjá sjófólki



Leiðarin á Trygdarmiðstøðini og føroyski fyriskiparin av IASST-tiltakinum, Marius Magnussen, er væl nøgdur við evnisdagin í Norðurlandahúsinum
Mynd: Jens Kr. Vang




Teir, sum hildu fyrilestur á evnisdegnum, fingu eina lítla gávu frá IASST. Her er tað Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, sum fær sína gávu
Mynds: Jens Kr. Vang



Pál Weihe, yvirlækni, helt áhugaverdan fyrilestur um strongdartekin hjá sjófólki
Mynd: Jens Kr. Vang

urlandahúsinum í gjár.

Yvirfyri útlendsku gestunum vísti hann á, at í Føroyum býr eingin av praktiskum orsøkum.

- Ein av stóru høvundum okkara, Heðin Brú, eigur hesi orðini. Vit liggja norður ímóti arktisku skipanini, har veturin er harður og myrkur. Føroyar liggja soleiðis árendar í mun til trýstskipanirnar, ið ferðmiklar koma bóltandi í beinari kós úr Mið- og Norðurameriku og geva okkum ein óvanligan turbulens í veðurlagnum.

Hann segði, at tá okkum so lítið er tillutað av landaøki í skapanarverkinum, er lagnufelagsskapurin við havið og loftrúmið sjálvsagdur.

- Vit liva mitt í sjónum og av tí sum úr sjónum kemur. Alt okkara vørukeyp uttanlands verður fíggjað við tilfeingisrentuni úr egnum fiskastovnum og umbýttum rættindum í fremmandum sjógvi.

Landsstýrismaðurin helt tað vera sera skilagott av altjóða felagsskapinum IASST at skipa várfundin 2008 í Føroyum.

- Amboðini, sum hava lívbjargað fólkinum í hesum oyggjum, hava verið bátar og skip í hundraðir av árum - ja, heilt síðan landnám. Vit kenna søguna um trygd á sjónum og ófatiliga kostnaðin av ov veikum lógarkarmum og fyriskipanum frá altjóða samfelagnum og ikki minst frá nationalum politiskum skipanum.

Tórbjørn ásannaði, at mannalív eftir mannalív eru í ótíð tikin úr mannaættini á hesi kontuni.

- Sivilisatiónin rakk tó umsíðir inn um lúnningarnar og bara í okkara tíð hava vit gjørt eitt skarvslop rætta vegin, sum ongin hevði roknað við kundi henda. Hetta sigi eg av egnum royndum sum sjófarandi alt mítt lív, líka fram til tann dag, tá politisk "basilla" hertók sálina og leinkjaði hana í óloysiligar fjøtrar.

### Trygd er lívsstílur

Landsstýrismaðurin segði, at trygd yvirhøvur er tíbetur vorðið eitt fyribrigdi, sum er nógv umrøtt í tíðini - eitt gott brand.

- Eisini í Føroyum er hetta nú ein lívsstílur. Politiska skipanin hevur raðfest hetta í fremstu røð í mong ár, og endamálið er áhaldandi ein optimalisering, ein støðug jagstran eftir 0-loysnini, har eingin dettur niður ímillum orsaka av, at fyrireikingarnar ikki vóru nóg dyggar.

Hann vísti á, at okkara trygdarstovnar eru ungir.

- Tað eru bert fá ár síðan, at hetta danska hjálandið skipaði hesi viðurskifti undir egnum ræði, segði Tórbjørn Jacobsen m.a., tá hann setti evnisdagin í Norðurlandahúsinum í gjár.

Sosialurin fer at venda aftur til ymiskt av tí, sum var frammi á hesum áhugaverda seminari um strongd hjá sjófólki.